

# Alt er ikki list

## - Onkur má rópa varskó, áðrenn mentamálaráðharrin fullkomiliga hevur útholað listahugtakið, so ongin kennir mun á dygd og lættisoppi longur, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð, bókavørður og ummælari

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Setanin av stýrisformanni fyri Listasavn Føroya er bert feskasta dømið um, hvussu landsstýrismaðurin í mentamálum vanvirðir øll tey, sum hava skil fyri list og mentan. Ei dáni í, at hetta høga ráð, sum varðar av okkara hægstu andligu virðum, millum manna leingi hevur verið kent sum "discountráðið", tí tað er tað tað er. Eitt andligt discountráð.

So bersøgin er Arnbjørn Ó Dalsgarð, bókavørður og ummælari, í lesarabrævinum "Alt er list", sum stóð í bløðunum herfyri Ð- eitt bræv, sum var ætlað sum eitt ramligt gúpp í afturpartin á mentamálaráðharranum

### Ein knívur í sárið

Arnbjørn Ó. Dalsgarð ivast ikki í, at tey eru mong við honum, sum leingi hava undrast yvir embætisførsluna hjá Jógvani á Lakjuni, mentamálaráðharra, tá tað ræður um avgerðir í mentanarligum spurningum. At so fá ella nærum ongin mutar ímóti er ikki so løgið, heldur Arnbjørn, tá mentamálaráðharrin tykist at skara framúr sum ein, ið ikki ætlar sær at lurta eftir teimum, sum hava skil fyri list og mentan.

Tað eru so nógv dømi um hetta eftirhondini, heldur Arnbjørn. Samanleggingin av ÚF og SvF varð týðiliga skundað ígjøgnum, uttan at tey, sum arbeiða har, ella nakar, sum hevði skil fyri tí, varð eftirspurdur ella tikin við uppá ráð. Vit hava fingið ein Tjóðpall við eini játtan og eini stjóraløn, sum líkist mest eini háðan móti teimum fólkum, sum skulu virka har, í hølum, sum als ikki liva upp til krøvini til ein slíkan stovn. Og sum ein seinasta dyggan frammaná hava vit nú fingið ein bankamann og ein sakførara at stýra okkara listarliga Tjóðsavni.

– Tað var mest hetta seinasta, sum fekk meg at skriva lesarabrævið. Fyri meg virkaði setanin av einum sakførara sum stýrisformanni fyri Listasavnið sum ein knívur, ið varð vendur enn einaferð í einum sári, sum stóð víðopið frammanundan. Ein endalig magtdemonstratión móti teimum, sum hava funnist at handfaringini av hesum málinum, har allar skilagóðar fakligar grundgevingar vórðu feiaðar av borðinum í eini handavending, sigur Arnbjørn

Hví mentamálaráðharrin konsekvent hevur valt at síggja burtur frá fakligum førleikum og væl undirbygdum atfinningum í hesum máli, er ilt at vita, heldur Arnbjørn. Ikki tí, tað var kanska ikki óvæntað, um mentamálaráðharrin við hesum vil vísa, hvør tað er sum ræður, sigur hann.

### Vanvirðing

– Eitt er, at vit mugu liva við einum mentamálaráðharra, sum ikki tykist at hava skil fyri list, og hansara discountloysnum á alt ov nógv týðandi mentamál. Tað eru vit so von við. Tað ringasta er, at hann harvið vanvirðir øll tey, sum vita nakað um hesar tættir, og soleiðis máar teirra trúðvirði burtur, sigur Arbjørn.

Arnbjørn vísir á, at fakfólk innan mentan og list hava í mong ár ikki verið serliga høgt í metum í Føroyum. Hetta sæst millum annað við, at tey sum heild hava verið lítið frammi í fjølmiðlunum í kraft av teirra fakliga førleika. Seinnu árini hava tey tó kortini verið nøkur, sum hava dittað sær til at koma við kvalifiseraðum boðum uppá góða og minni góða list. Og hetta er avgjørt ein gongd, vit sum mentað tjóð, eiga at fegnast um.

– Tí er tað onki minni enn undrunarvert, at okkara evsti metanarligi mynduleiki nú gongur á odda fyri at køva hesar røddir aftur so náðileyst, at alt kjak nærum tagnar. Men fyri tað eru øll ikki hildin uppat at hugsa, og tað má mentamálaráðharrin ikki gloyma. Tað var fyrst av øllum tað, eg vildi vísa á við mínum lesarabrævi, sigur Arnbjørn.

### Snobbar niðureftir

Arnbjørn minnir á, at tað jú ikki er nøkur loyna, at í Føroyum eru tey lutfallsliga nógv, ið vilja kalla seg listafólk av onkrum slag. Tí kann tað vera sera vandamikið fyri ein politikara at vera ov bersøgin ella avgjørdur í sínum meiningum um, hvat er dygdargóð list. Og mentamálaráðharrin hevur longu gjørt greitt, at fyri hann er tað ein stórur spurningur, hvør hevur skil fyri list. Tað var hansara svar, tá hann í eini tíðindasending herfyri varð spurdur um setanina av stýrisformanninum fyri Listasavnið.

– Okkurt kundi bent á, at í berum ótta fyri at traðka veljarafjøldina á tarnar er mentamálaráðharrin í staðin farin at snobba niðureftir við at billa fólki inn, at fólksligmentan og list er tað sama. At lifra fyri populismuni uppá handan mátan er jú ein væl kendur og uttan iva sera effektivur máti at skora sær nakrar bíligar atkvøður.

– Um tað veruliga er sannføringin hjá mentamálaráðharr-anum, at ongin skal siga nøkrum, hvat er sonn list ella góð mentan, so er alt jú list og vit øll listafólk. Hetta sær eisini í stórum út til at vera mentanarpolitiska skráin hjá landsins politisku leiðslu í løtuni Ð- ein skrá, sum so dyggiliga er í ferð við at úthola alt lista- og mentanarhugtakið sum tað er. Og tá er heldur ongin meining í at meta um list ella seta nøkur krøv til hana longur, sigur Arnbjørn.

Andliga armóðin, sum fylgir í kjalavørinum á einum slíkum hugburði, er ikki bara syndarlig. Hon er eisini vandamiklil tí hon elur fram eitt andligt leti, sum í síðsta enda máar støðið undan fólkaræðinum. Tað er so nógv, sum bendir á, at tað er ein trupulleiki nú á døgum at krevja nakað av fólki, heldur Arnbjørn. Vit síggja tað til dømis í Útvarpi Føroya, sum heldur enn at gera dygdargóðar vitanarsendingar, í stóran mun velur at brúka orkuna uppá lættisoppakent undirhald. Men vit vita, at hetta ikki er fremsta uppgávan hjá almenna Útvarpinum. Líka so lítið er tað